# Jólakalendari og teknmál í vanda

**Kringvarpið má spara, staðfesti stýrið á fundi fríggjadagin. Hetta kann koma at ganga út yvir tey deyvu, tí stovnurin setir seg ikki føran fyri at gjalda kostnaðin av teknmálstulkingini. Eisini gongur hetta út yvir næsta jólakalendara í sjónvarpinum**

SPARING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Stýrið fyri Kringvarp Føroya viðgjørdi á fundi fríggjadagin støðuna, sum kringvarpið er komið í viðvíkjandi samanleggingini av útvarpi og sjónvarpi. Sparingar standa á skránni, og hetta kann millum annað fara at ganga út yvir tulkingina til teknmál.

Niðurstøðan hjá stýrinum er, at skal avgerðin um at leggja útvarp og sjónvarp saman hava meining, er neyðugt í næstu framtíð at taka stigið til endaligu samanleggingina. Næsta stigið er at leggja programmvirksemið saman og at broyta bygnaðin samsvarandi hesum, skrivar stýrið fyri Kringvarið í tíðindaskrivi.

- Áðrenn hetta kann setast í verk, er neyðugt, at politiski myndugleikin tekur endaliga avgerð um karmarnar fyri framhaldandi arbeiðinum við samanleggingini. Í samráð við Mentamálaráðið hevur higartil verið arbeitt eftir eini ætlan um at savna alt virksemið undir einari lon, men arbeiðið er steðgað upp, tí politiski myndugleikin ikki hevur framt løggávuna, sum er fyritreytin fyri hesum, skrivar stýrið, ið metir, at skal arbeiðið, sum er lagt í samanleggingina, ikki fara fyri skjeytið, er neyðugt, at løggávan verður framd í hesi tingsetuni. Tí mælir stýrið flokkunum aftanfyri fjølmiðlasemjuna til, at avtala verður gjørd um framtíðina hjá kringvarpinum í einum komandi samgonguskjali.

Stýrið fer nú undir at fyrireika setan av nýggjum stjóra, sum skal standa á odda fyri víðari arbeiðinum við at leggja útvarp og sjónvarp saman.

Á fundinum fríggjadagin viðgjørdi stýrið eisini rakstrarstøðuna hjá kringvarpinum. Tá undirtøka ikki var fyri at hækka kringvarpsgjaldið, verður neyðugt at spara í minsta lagi tríggjar mió. krónur í rakstrinum í 2008.

- Fyri at fáa raksturin at hanga saman hevur stýrið samtykt nakrar sparingar á fundinum fríggjadagin. Herundir fer kringvarpið at boða Mentamálaráðnum frá, at skal teknmálstulkingin av tíðindasendingini hjá sjónvarpinum halda fram eftir 1. februar, má Mentamálaráðið átaka sær allan kostnaðin av hesum.

Eisini fer kringvarpið at heita á landsstýrið um at bera ein part av kostnaðinum av løgtingsvalinum. Harumframt hevur stýrið eisini staðfest, at verkætlanin við jólakalendaranum 2008 í sjónvarpinum, sum arbeitt hevur verið við í nøkur ár, ikki kann fremjast, uttan so at serstøk figging kann útvegast til hana.

Stýrið staðfesti á fundinum fríggjadagin, at fleiri størv eru ósett í løtuni, tí fólk annaðhvørt eru farin úr starvi ella eru í farloyvi. Sum grundarlag fyri rakstrarætlanini í fyrsta ársfjórðingi hevur stýrið avgjørt, at hesi størv ikki verða sett aftur, fyrr enn stýrið hevur havt møguleika fyri at viðgera framtíðar rakstrargrundarlagið hjá stovninum saman við komandi landsstýrismanninum í mentamálum. Sostatt verður ikki talan um uppsøgnir fyribils, endar skrivið hjá stýrinum fyri Kringvarp Føroya, sum Rúni Heinesen, formaður, hevur undirskrivað.



*Jólakalendarin verður spardur burtur í Kringavarpinum. Um ikki Mentamálaráðið finnur pening til upptøkurnar, fáa børnini ongan føroyskan jólakalendara í sjónvarpinum í desember*


RUKO
LÁSATÆNASTA
Ruko

- Umleggja alt til sama lykil
- Vit kopiera lyklar
- Útvega allar lásakassar
- Útvega lásasystem



Vit eru serkønir á økinum

VALDEMAR LÜTZEN BYGGIBÚÐ • TÍN BYGGIBÚÐ OG LÁSATÆNASTA
SKÁLATRØÐ 14 • TÓRSHAVN • TEL 30 10 20



Val av limum til UMBOÐSRÁÐIÐ fyri OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

- **Í februar mánaði ár 2008 skulu 11 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna. Valið er galdandi í fýra ár.**

Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna innan 1. februar 2008.

Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum og tess dótturfeløgum.

- **Allir tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F eru limir í felagnum.**

Ognarfelag Tryggingartakaranna er eitt felag við avmarkaðari ábyrgd, hvørs endamál millum annað er, beinleiðis ella gjøgnum annað felag, at eiga partapening í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F og øðrum feløgum og annað íløguvirksemi.

Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi.

Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavíst 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni ella á heimasíðuni www.trygging.fo.

Tórshavn, 3. januar 2008
**Ognarfelag Tryggingartakaranna**
**Stjórnin**

www.sansir.fo

OGNARFELAG
TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · Postboks 329 · FO-110 Tórshavn
Tel 345600 · Fax 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo